

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 02 - 2012

## Jarðfeingi varpar ljós á oljuleiting við Føroyar

Aftur í ár skipar Jarðfeingi fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Endamálið er at kasta ljós á oljuleiting á Føroyaøkinum. Ráðstevnan hevur áður verið væl vitjað við út við 100 luttakarum skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu. Í døgunum 1. og 2. mai í ár hevur Jarðfeingi enn einaferð høvi at bjóða til oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Hetta er fjórða ráðstevnan í røðini Faroe Islands Exploration Conference. Endamálið er at skapa eitt vísindaligt rúm, har felags áhugamálið er olju- og gassleiting á føroyska økinum. Har umframt er ráðstevnan eitt gott høvi at knýta samband og samstarv millum granskingarheimin og vinnuna. Tær undanfarnu ráðstevnurnar hava savnað umleið 100 jarðfrøðingar og jarðalisfrøðingar úr øllum heimi at viðgera nýggj úrslit kring oljuleiting á basaltøkjum. Undan sjálvari ráðstevnuni verður skipað fyri einum útferðardegi, og sama kvøld verður høvi hjá luttakarunum at koma saman til eina hugnaløtu í Norðurlandahúsinum, har umboð fyri Fróðskaparsetur Føroya fer at greiða frá tínum virksemi. Dagin eftir byrja fyrilestrarnir, og varar hesin partur í tveir dagar. Fyrilestrarnir frá teimum undanfarnu ráðstevnunum í 2004 og 2006 eru givnir út í bók, meðan bók við fyrilestrunum frá 2009 kemur út í næstum. Áhugaði kunnu lesa meira á ráðstevnuheimasíðuna http - //fiec.jf.fo